LM-099/2023

Fylgiskjal 15

Viðmerkingar til Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu

Um undirritaða

Undirritaði arbeiðir sum ferðaleiðari, og hevur egna fyritøku, sum skipar fyri bátatúrum.

Í hesum skrivi vil eg royna at geva íblástur og okkurt hugskot í samband við nýggja uppskotið til "Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu".

Fyrst ein tøkk

Fyrst vil eg takka landstýrismanninum í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum fyri uppskotið til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógina). Í sama mun skal eg takka Føroya Landsstýri fyri at okkara tjóð loksins fekk eina Løgtingslóg um náttúruvernd. Tit hava ósjálvsøkið megnað, har onnur víktu. Við hesum herðaklappi vil eg heita á tykkum, um at standa støðuføst um Lógina um burðardygga ferðavinnu.

Eitt barnaminni

Sum smádreingir brúktu vit hvørja løtu í náttúruni. Vit spældu í fjøruni, og fangaðu ymisku djórini sum livdu har. Vit bygdu flakar, og róðu á vágni, og summir av flakunum høvdu eisini mastur og segl. Sera ofta fóru vit tó niðaneftir til fjals. Vit høvdu stóran áhuga fyri fuglunum, og kendu vit øll fuglasløgini – eisini tey sjálvsomu. Okkara "*Fuglabókin*" hjá Mikkjali á Ryggi stendur enn í hyllini, nógv merkt av dúgligum brúki.

Stórstur var áhugin at fiska síl. Vit gingu eftir áunum, og fiskaðu í hvørjum hyli. Sílini høvdu vit livandi í eini spann, og tóku tey heim við. Vit demmaðu hyl í ánni og høvdu sílini svimjandi har. Tað vóru vikur, har vit fiskaðu síl hvønn tann einasta dag. Summar tíðir gingu vit fylgjandi dagar, í eina heila viku, allan vegin frá bygdini, niðan ígjøgnum ánna, og heilt niðan á Mýrarnar. Á vegnum fiskaðu vit síl í øllum hyljunum. Hetta svarar til einar hundrað kilometrar av gongd fyri vikuna. Vit merktu onki til nakra møði, og livdu okkum inn í fiskaríið við lív og sál.

Vit fiskaðu eisini síl á einum náttúruvøkrum vatni, sum lá umleið ein tíma til gongu frá bygdini. Einaferð vóru vit á ferð út til vatnið at fiska síl. Vit mundu vera umleið 9 ára gamlir tá. Væl áleiðis niðan á vatnið við tráðunum, møttu vit seyðamanninum. Hann var ein av eigarunum av haganum, har sum vatnið lá. Seyðamaðurin segði við okkum, at nú var lembingartíð, og vit máttu ikki fara út á vatnið at fiska, tí seyðurin mátti ikki órógvast. Vit hildu hetta vera sera órættvíst, tí vit høvdu als ongan áhuga í seyðinum, og ynsktu bara at fáa frið at fiska. Har gjørdist tó ikki meir hjá okkum, vit máttu venda við aftur. Hesin seyðamaður skeldaði okkum ikki, men hóast tað, so kendist ongantíð aftur nøkur gleði við at síggja hann.

Um uppskotið

Í endamálsorðingini verður nevnt at ferðavinnan skal skipast á burðardyggum grundarlagi og harvið tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur og vinnumøguleikar hjá fólki kring landið.

Eg haldi, at lógarásetingarnar leggja upp til júst hetta:

- Fólkaræði – Føroya fólk ynskir lógartryggjaðan rætt til náttúruna
- Frælsi – At frítt kunna leita til náttúna annahvørt á landi ella sjó er frælsi.
- Trivnaður – Menniskjan hevur tørv á náttúruatgongd fyri at kunna trívast. Hetta er galdandi bæði fyri okkum føroyingar og fyri okkara gestir. Við at gera góðar ferðavinnuætlanir kunnu kommunur, staðbundnar nevndir, í samráð við eigarar ella brúkarar av lendi, tryggja skynsama fyriskipan og menning av ferðavinnuni á staðnum. Hesar ferðavinnuætlanir verða gjørdar staðbundið, og vilja tí fremja trivnaðin í lokaløkinum.
- Inntøkur – Ferðavinna er heimsins størsti vinnugeiri. Ferðavinnan skapar sera nógv áhugaverd arbeiðspláss. Arbeiðsplássini geva inntøkur til familjur, sum við hesum inntøkum kunnu byggja sítt heim. Av lønarinntøkunum í ferðavinnuni verður goldin skattur til samfelagið. Í Føroyum eru skattainntøkurnar frá ferðavinnuni við til at tryggja okkara vælferðarsamfelag við ókeypis skúlagongd, heilsurøkt, almennari samferðslu, fólkapensjón osf. Hetta merkir, at allir borgarar í landinum fáa ágóðan av arbeiðsplássunum í ferðavinnuni.
- Vinnumøguleikar - At frítt at kunna stovna ferðavinnuvirksemi er frælsi. Í Føroyum hava vit ikki hetta frælsi í øðrum tilfeingisvinnum, tí at tilfeingið er vorðið ein privatur rættur hjá teimum fáu.

Viðmerkingar til lógartekstin:

Lógartekstur verður skrivaður við skráskrift í klombrum við eftirfylgjandi viðmerkingum.

Viðmerking 1

Í øllum ásetingum, har náttúra fyrikemur eigur náttúra at verða nevnd fyrst. Dømi:

"§ 4. Øll, sum ferðast ella uppihalda sær uttangarðs, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru eigara, brúkara, fenaði, náttúru, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa."

Uppskot til rætting:

"§ 4. Øll, sum ferðast ella uppihalda sær uttangarðs, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru náttúru, eigara, brúkara, fenaði, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa."

Viðmerking 2

"§ 8. Kommunan skal í samráð við eigara og brúkara, viðkomandi myndugleikar og stovnar merkja upp farleiðir og gera nýggjar farleiðir til tess at skipa ferðsluna uttangarðs."

Tað eru nakrar gonguleiðir, sum verða nógv brúktar. Dømi eru Slættaratindur, Kallur, Trælanípan og Drangarnir. Tílík støð er umráðandi fyri náttúru og trygd, at gøtur verða gjørdar beinavegin. Til at fáa hetta framt skjótt eru fleiri mátar møguligir. Til dømis:

- Árliga inntøkan hjá komununum frá "Náttúrugjaldinum" er avmarkað í mun til ávís støð, har farleiðir koma at kosta nógvan pening. Ein grunnur eigur tí at verða stovnaður, sum kommunur kunnu søkja sær lagalilga fígging úr, til at fáa gjørt neyðugar farleiðir sum skjótast. Møgulig skuld av hesum lánum eigur ikki at ávirka talið av skuldarálíkningum kommunan hevur.

- Har slíkar nýggjar farleiðir væntast at innibera munandi kostnað, skal vera møguligt hjá landstýrismanninum, í samráð við kommununa, við kunngerð at áseta eitt rímuligt lokalt trygdargjald (Dømi max 100kr fyri hvønn vitjandi), til at fáa arbeiðið framt skjótt. Tá arbeiðið við farðleiðini er gjørt liðugt, skal hetta gjaldið falla burtur.

- Tað er sannlíkt, at kommunur saman við staðbundnum nevndum og í samráð við eigarar/brúkarar, nøkur ávís støð, fara at viðmæla/ynskja, at túrar bert kunnu gerast við staðkendum ferðaleiðara. Har hetta er skilagott, skal vera heimild at krevja eitt gjald fyri at løna ferðaleiðara og umsiting. Hetta gjald má tó vera rímuligt (Dømi 100kr).

LM-099/2023

Brúk av okkara "Løgtingslóg um náttúruvernd"

Í Føroyum er Mykines serstakt, tá tað kemur til fuglalív. Samstundis er Mykines Ramsar náttúruverndarøki. Tað er ein sannroynd, at Mykines er fyri stórum trýsti av ferðafólki. Tí má í Mykinesi vera ein serlig skipan galdandi. Føroyar fingu í 2023 *"Løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2023 um náttúruvernd"*. Lógin hevur eina lógargrein um *"Tjóðgarðar"* nevniliga §20, sum sigur:

"§ 20. Sum tjóðgarðar kunnu verjast størri náttúruøkir, sum bera í sær serstakar ella umboðandi vistskipanir ella landsløg, sum í høvuðsheitum ikki hava verið fyri tyngri náttúruinntrivum.
Stk. 2. Í tjóðgørðum skal eingin varandi ávirkan á náttúruumhvørvið ella mentanarminnir fara fram, uttan so at slík ávirkan er ein fyritreyt fyri at røkja verndarendamálið. Verndarkunngerðin sambært § 19 skal verja landslagið við plantum, dýrum, jarðfrøðiligum fyribrigdum og mentanarminnum fyri útbygging, verkløgum, dálking og øðrum virksemi, sum kann skaða verndarendamálið, og tryggja møguleikan at uppliva náttúruna í frið og náðum. Verndin er ikki til hindurs fyri gongd við fyriliti. Slík ferðsla kann eftir kunngerðini bara avmarkast ella forbjóðast í avmarkaðum økjum í einum tjóðgarði, og bara tá ið tað krevst til at verja plantur ella dýr, mentanarminnir, leyst jørðildi ella jarðfrøðilig fyribrigdir.
Stk. 3. Uppkast til umsitingarætlan skal leggjast fram samstundis við verndarkunngerðina. Er tað eisini viðkomandi at gera røktarætlan, skal hon vera partur av umsitingarætlanini."

Skotið verður upp, at Mykines verður fyrsti Tjóðgarður Føroya.

Í hesum sambandi verður gjørd ein umsitingarætlan, har vitjandi í búárstíðini hjá lundanum, einans kunnu vitja Mykines á skipaðum túri í fylgi við ferðaleiðara. Hvør ferðaleiðari kann í mesta lagi hava 20 gestir hjá sær. Umsitingarætlanin kann seta avmarking á talið á vitjandi í oynna um dagin.

Ein skipan við litum – til dømis við litaðum vestum – verður gjørd í oynni til tess at deila tey vitjandi í hóskandi bólkar. Ein ætlan verður gjørd fyri nær bólkarnir fara til gongu – til dømis ber til at hava 15 minuttir ímillum, at hvør bólkur fer avstað. Umsitingarætlanin skal leggja ætlan um, hvussu leingi, hvør bólkur kann vera uttanfyri bøgarðarnar. Arbeiði við at deila upp í bólkar, deila vestar út, skipa gongdina, samla vestar inn og umsita reinhald av vestum skal vera lønt, og, um møguligt, umsitið av Mykinesfólki.

Umsitingarætlanin skal eisini fevna um ferðsluna til og frá oynni, soleiðis, at gestirnir eru í Mykinesi í eina hóskandi tíð, og ikki noyðast at vála fyri at fáa tíðina at ganga, aftaná teirra gongutúr niðan á oynna. Eisini skal umsitingarætlanin taka støðu til, um loyvt skal vera hjá "smábátum" at føra fólk í oynna, ella, um bert tann almenna farleðin skal hava hesa uppgávuna um hendi.

Ferðaleiðarin í Mykinesi kann hava fylgjandi førleikar:

- Lokið føroyska ferðaleiðaraútbúgving, og hevur royndir ella skeið í at vera ferðaleiðari í Mykinesi. Hevur galdandi fyrstuhjálparskeið.
- Hevur tilknýti í Mykinesi, og hevur lokið skeið í at vera ferðaleiðari í Mykinesi. Hevur galdandi fyrstuhjálparskeið.

Gjaldast skal fyri at vitja Tjóðgarðin.

Skipaðir túrar í Mykines skulu gjalda eitt gjald, sum skal umsita Tjóðgarðin. Dømi um gjald kann vera: Vaksin 300kr. Børn 0 kr.

Ein partur av gjaldinum skal fíggja umsiting og stýring av gongdini í Mykinesi. Tað vil siga lønir og útgerð.

Gransking.

Ein partur av gjaldinum fyri skipaðar túrar í Mykines skal fara til gransking innanfyri fugl í oynni. Granskingin skal hava høvuðsfokus á fugl í Mykinesi, men kann eisini fevna um fuglateljingar í øðrum økjum enn Mykines.

Fuglasavn í Mykinesi.

Eitt fuglasavn eigur av somu inntøkum verið gjørt í bygdini. Har skal vera møguligt hjá fólki at læra um fuglarnar. Bútíð, føði, liviháttur osf. Savnið má hava útstappaðar fuglar, so fólk kunnu læra um ymisku fuglasløgini. Savnið skal eisini vísa, hvussu fuglur hevur verið brúktur, sum eitt týðandi tilfeingi í Mykinesi.

Man kann hava livandi myndir frá lundaholum, eins og gjørt verður í Noregi. Fuglaveiðuamboð, myndir av fuglaveiðu, súluveiðu, matgerð úr fugli, og so framvegis. Staðkent fólk kann hava til uppgávu, at greiða fólki frá um fugl, og frá søgum um fuglaveiðu í Mykinesi.

Biografur kann vera á savninum, har filmsbrot frá filmsupptøkum, sum eru gjørdar ígjøgnum tíðina, kunnu vísast. Tað skal vera møguligt at keypa eitt gott úrvæl av ferðaminnum "souvenir" á savninum. Savnið kann eisini eftir umbøn lata upp í "lágárstíð", so at gestir fáa eitt sindur meira burturúr eisini hesa tíðina á árinum. Savnið kann vera við til at skapa heilárs arbeiðsplass í Mykinesi.

Ein møguleiki er eisini, í samráð við Listasavnið, at Fuglasavnið hevur nakrar málningar av Sámal Joensen-Mikines at vísa fram.

Skotið verður harumframt upp, at byrsuveiða av svartfugli í Føroyum verður bannað til fuglateljingar prógva, at stovnurin tolir veiðu. Tað eigur harumframt at vera krav, at øll fuglaveiða í Føroyum, eisini av havhesti, skal fráboðast og skrásetast í eina almenna databasu.

LM-099/2023

Vit eiga heimsins bestu ferðafólk

Vit føroyingar er vælsignaðir. Vit eiga eitt land við stórfingnum landsløgum, livandi náttúru, vøkrum bygdum, frískari luft, reinum vatni, góðari samferðslu, tryggum umhvørvi, livandi mentan og egnum máli. Vit eiga harumframt eisini heimsins bestu ferðafólk.

Føroyar er eitt dýrt land at vitja. Tí fáa vit bara "motiveraðar" gestir, sum hava bestu ynski. Tey eru náttúruvakin, forvitin, og vilja fegin hoyra um okkara veruleika her úti í Atlantshavinum. Nógv teirra halda okkara land vera besta stað í heiminum at vitja.

Okkara ferðafólk koma til Føroyar úr øllum heraðshornum. Summi hava hoyrt um Føroyar í skúlanum, og nú hava tey umsíður møguleikan at vitja. Onnur síggja vakrar myndir á netmiðlum, og vilja nú síggja við egnum eygum, og sjálvi taka myndir. Uppaftur onnur hava lært um Føroyar, tí tey hava sæð føroysk ítróttarfólk gera brøgd á leikvøllum. Og so eru tað tey, sum hava okkurt tilknýti til lítla landið í havinum.

Nógv koma, tí tey hava hoyrt frá øðrum, at tey hava havt eina góða uppliving í Føroyum. Hetta havi eg upplivað á mínum bátatúrum. Tað eina árið hevði eg tríggjar ungar Hálendarar umborð á bátatúri. Seinni, sama ár, komu tveir afturat av teirra vinum, og lótu heilsa frá hinum trimum. Árið eftir komu trí vinfólk afturat frá sama vinarbólki við á bátatúr. Á henda hátt ber til at skapa stórt marknaðarvirði við at hava nøgdar og glaðar gestir.

Ofta verður sagt, at okkara ferðafólk eru ovurhonds rík, og tí kunnu krevjast eftir peningi, uttan at tey leggja stórvegis í tað. Hóast tað kemur fyri at fólk eru rík, so hava næstan øll eitt livistøði, sum kann samanberast við okkara.

Mín fyrsta uppgáva, sum ferðaleiðari var ein bólkur hjá Greengate. Gestirnir vóru úr Japan. Ein kvinna á ferðaliðnum, sum eg tosaði við, hevði spart upp í fleiri ár, fyri at fáa ráð til ferðina. Hennara stóri dreymur var at koma til Føroya fyri at síggja lunda. Mykines var við í ferðaskránni, men í fleiri dagar, var veðrið ikki til vildar, og báturin avlýsti. Tann seinasta dagin, áðrenn tey skuldu avstað, eydnaðist tíbetur at koma til Mykines. Gestirnir fingu ein frálíkan dag í Mykinesi við nógvum lunda og góðum veðri.

Í fyrraárið arbeiddi eg sum ferðaleiðari fyri eina ferðaskrivstovu, sum gjørdi útferðir. Ein av gestunum á nøkrum av útferðunum var ein kvinna, sum úr USA. Hon var so hugtikin av Føroyum, at hon aftur var og vitjaði Føroyar síðsta summar. Tá fekk hon sær eina vakra tatovering á armin av Føroyakortinum og føroyska flagginum. Hon hevur seinni hildið fyrilestur um Føroyar á bókasavninum, í Ohio, har sum hon arbeiðir.

Eg var einaferð ferðaleiðari hjá einari familju úr Jakarta, tveimum vaksnum og tveimum børnum. Tá lærdi eg, at í Jakarta kundu børnini ikki spæla úti vegna luftborna dálking. Pápin hevði sína egnu fyritøku, sum seldi motoroljur. Mamman var útbúgvin løgfrøðingur, men hesa útbúgving fekk hon tó ikki brúkt, tí hon noyddist av vera heimaarbeiðandi. Í íbúðini, har sum tey búðu, høvdu tey eitt luftfiltur. Luftfiltrið mátti reinsast tvær ferðir um dagin, og hetta arbeiði tók mammuni tríggjar tímar. Um filtrið ikki varð reinsað, var heldur ikki heilsugott hjá børnunum at spæla innandurða. Hetta hendi áðrenn koronufarsóttina, og áðrenn vit í Føroyum vandust við at síggja fólk við munnbindi. Familjan kom øll við munnbindi til Føroyar, men tað var eitt satt frælsi fyri tey at kunna taka munnbindið av, tær tvær vikurnar tey vóru í Føroyum.

LM-099/2023

Til seinast

Føroyar er eitt heilt serstakt stað. Í Føroyum búgva vit tætt at náttúruni. So tætt, at vit eru ein partur av náttúruni. Í Føroyum skylda vit okkara børnum ein lógartryggjaðan rætt til frítt at vitja náttúruna. Einans við, at okkara børn vitja náttúruna, kunnu tey læra náttúruna at kenna. Og einans við at kenna náttúruna, kunnu tey verja náttúruna. Tað fara tey at klára - eisini um tey bjóða øðrum heimsborgarum við út í føroysku náttúruna.

Vinarliga

Samson Højgaard, ferðaleiðari og vinnurekandi.